# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Hanna og Osmund Olsen gullbrúdleyp



Leygardagin 19. november vóru tað 50 ár síðani, at Hanna og Osmund Olsen við Gøtugjógv góvu hvør øðrum sítt ja. Dagin hildu tey saman við familjuni.

Hanna, sum er fødd 14. januar 1936, er ættað úr ovara Króki á Toftum. Foreldrini vóru Dorthea og Jógvan Højgaard. Hanna og tey vóru seks systkin - Henning, sum undir krígnum fórst við Verdandi, Hilda doyði sum átjan ára gomul av tuberklum, Kristin sum var ógiftur og búði heima og doyði í áttati árunum, Dania Alberg býr í Havnini, Eskild býr á Toftum og so Hanna.

Osmund, sum er føddur 1. august 1927, er ættaður úr Fuglafirði. Foreldrini vóru Malena og Óla Jákup Olsen, sum eisini varð nevndur Gøtu Óla Jákup. Osmund og tey vóru níggju systkin - Olivar í Fuglafirði, Astrid Vørðhamar í Fuglafirði, Olli í Grønlandi, Arnhold á Skála, Borghild Eliasen í Fuglafirði, Osmund, Palli í Fuglafirði, Halgerð Rask Andersen í Danmark og Jóna Thomsen í Danmark. Olivar og Olli eru farnir foldum frá.

Tá ið Hanna og Osmund giftust í 1955, búsettust tey í barndómsheiminum hjá honum í Fuglafirði. Í 1965 fluttu tey út til Gøtugjógv at búgva. Tá tók Osmund við festinum, sum liggur til Gjáarhaga, og sum elsti beiggi hansara, Olivar Vaktarhús, hevði sitið við.

Gjáarhagi ber 40 áseyðir, og tað ber boð um, at tað hevur verið neyðugt við øðrum arbeiði. Osmundur royndi sjólívið sum yngri, men hann gjørdist heimamaður. Hann var bilførari. Hann koyrdi rutu úr Fuglafirði og út á Toftir, og hann koyrdi gøtubørn í skúla í Fuglafirði, og skúlabørnini í framhaldsdeildini í Fuglafirði til Runavíkar, har tey í fleiri ár høvdu handligar lærugreinar. Samstundis arbeiddi Osmund á Tøtingarvirkinum.

Hanna var heima hjá børnunum, meðan tað vuksu upp. Seinni arbeiddi hon á Tøtingarvirkinum, og so hevur hon arbeitt á fiskavirkjum í mong ár, og tað ger hon framvegis.

Hanna og Osmund eiga trý børn - Maria Lindberg í Klaksvík, Henning við Gøtugjógv og Oddma á Toftum. Barnabørnini eru ellivu og í næsta ættarliðnum eru seks komin.

Ein av føstu bygdarmyndunum við Gøtugjógv er, at Hanna og Osmund eru á veg til og frá salinum Filadelfia. Har hava tey verið ógvuliga trúgv. Hanna spældi orgul í mong ár, og Osmund hevur stuðlað væl í felagssanginum.

## Andlát og jarðarferðir

**Sjúrður Jóhann-Hendrikson Poulsen**, ættaður úr Skopun, búsitandi í Reykjavík í Íslandi, andaðist sunnudagin 20. november, 59 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Gravavogskirkju í Reykjavík mánadagin klokkan 13.

Kistan við Jóhannes **Martin Johannesen,** vanliga nevdur Hanne, úr Fuglafirði, fer úr Landssjúkrahúskapellinum týsdagin klokkan 17. Jarðarferðin verður úr Fuglafjarðar kirkju mikudagin klokkan 13.

Kistan við **Eliesar Sørensen**, vanliga nevndur Eliesar í Fugloy, fer úr kapellinum Klaksvíkar Sjúkrahúsi heim í Betesda í kvøld klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Betesda mikudagin klokkan 13:30. Vit kunnu leggja afturat, at tað er á 100 ára degi Eliesars. Tey, ið vilja minnast Eliesar, kunnu lata eina peningagávu til Akurin. Konto í peningastovnunum.

## Dagurin í morgin

**23. november. Klæmintsmessa**. Vit vita, at hesin Clemens (deyður umleið ár 107) livdi í Róm, tá ápostulin Pætur var á døgum, og gjørdist triði maður í stóli hansara. Eftir øllum at døma hevur hann skrivað tað brævið, ið verður rópt fyrra Klæmintsbræv, sum er frá árinum 96. Um Klæmint sjálvan eru nógvar halgisøgur, og sagt verður frá, at hann endaði dagar sínar við at verða blakaður í havið við einum akkeri um hálsin. Hann hevur síðani tá verið virdur sum ein av verndamonnunum hjá teim sjófarandi.

*Latínska navnið Clemens merkir hin mildi.*

## Tróndur Húsgarð 75 ár



Leygardagin 19. november fylti Tróndur Húsgarð í Havn 75 ár.

Tróndur er ein býarmynd í Havn, har hann til fyri fimm árum síðan arbeiddi sum arbeiðsformaður hjá Tórshavnar kommunu. Hann kendi kloakkskipanina í býnum so væl, at hann var til stóra hjálp hjá teimum sum løgdu allar kloakkir og aðrar veitingar hjá kommununi inn á teldu.

Tróndur er úr Syðrugøtu. Hann er triðyngstur av teimum átta børnunum hjá navnframa bóndanum, Líggjasi Húsgarð, og Sofiu Mariu, sum var frá Gøtugjógv.

Sum ungur var Tróndur á landbúnaðarskúla í Noreg og arbeiddi har eina tíð. Hann giftist í Noreg í 1958 við Onnu úr Fuglafirði. Hon er dóttir Hendrik á Buð (Olsen), sum var frá Gøtugjógv og Katrinu (Trinu), sum var úr Elduvík.

Anna og Tróndur fluttu aftur til Føroya seinast í fimmtiárunum og bygdu í Brøttubrekku, har tey fluttu inn í 1963. Tróndur arbeiddi hjá Jarðarráðnum, har hann m. a. velti upp úr nýggjum og gjørdi uppdyrkingarvegir.

Tá Tórshavnar kommuna í 1974 fór at gera vegin úr Kaldbak til Hvítanes, fekk Tróndur starv hjá kommununi sum arbeiðsformaður. Tá arbeiðið við Kaldbaksvegnum varð liðugt, fór Tróndur at fáast við smærri arbeiði hjá kommununi í Havn, serliga kloakkarbeiði og smærri vegaarbeiði. Hann arbeiddi hjá kommununi til hann var 70 ára gamal.

Av frítíðarítrivum hjá Trónda eru at nevna, at hann er virkin í dansifelag Kaggans. Eisini hevur hann seksmannafar og er ofta í fjørðinum. Eisini hevur hann putlast nógv í urtagarðinum rundan um húsini.

Anna og Tróndur eiga fýra børn: Eyðun, sum er prentari og stjóri á Prentmiðstøðini, Tórfinn, ið er sjálvstøðugur snikkari, Hendrik, ið er maskinverkfrøðingur hjá Alpha Diesel í Frederikshavn, og Karin Margretha, sum er havfrøðingur og starvast á Fiskirannsóknarstovuni.

Tróndur eigur 9 abbabørn.

---

†

Eliesar Sørensen, vanliga nevndur

**Eliesar í Fugloy**

andaðist á Klaksvíkar sjúkrahúsi 20. november.

Børan fer úr kapellinum heim í Betesta týskvøldið kl. 18.00.
Jarðarferðin verður úr Betesta kl. 13.30
23. november, sum er
100 ára føðingardagur Eliesars.

*Fyri tey avvarðandi*
**Líggjas**

*Til ber at minnast Eliesar við at lata eina peningagávu til Akurin, sum hevur konto í peningastovunum. Peningurin fer óskerdur til trúboðaravirksemi samkomunnar úti í heimi*

---

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá okkara góða mamma, vermamma, omma og langomma

**Sigrid Semona Gaard**
Oyndafirði

doyði og varð jarðað.

Hjartans tøkk til Eysturoyar Røktarheim fyri tíðina, hon var har.
Tøkk fyri blómur og gávur, og tøkk øll tit, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Elin, Jens Petur, Sigga og Margretha**